## DAGSINS MEINING

# Útskrivið kapping um nýggja MVG skipan

Búskaparliga gongdin kemur at krevja sparingar innan tað almenna, og fráboðaðu sparingarnar á Toll og Skatt eru helst bert byrjanin, um lágu skattainntøkurnar, ið vit hava sæð í januar mánaði í ár, halda fram.

Óansæð hvussu tíðirnar eru, so eigur skatta- og avgjaldsinnkrevjing prinsippielt at verða umsitið so bíligani sum møguligt og so smidligani sum møguligt, so at almenna pengaorkan fer til beinleiðis tænastur og veitingar, ið borgarin betalir skatt fyri. Tað vil siga, at øll innkrevjing hjá tí almenna skal vera til minst møguligan kostnað og ampa hjá skattgjaldarnum.

Sum vit hava sæð á kjakinum um MVG eftirstøður seinastu dagarnar, og sum vit viðgjørdu í oddagrein í gjár, so er okkara MVG skipan ikki fullkomin. MVG skipanin kom fyri gott 10 árum síðani og er grundað á tað tilfeingi og ta tøkni, ið nú einaferð var tøk tá. Nú eru umstøðurnar nógv broyttar. Tøknin mennist so skjótt, at skipanir verða afturútsilgdar eftir fáum árum. Nú er tíð at yvirhála alt innkrevjingarøkið hjá tí almenna, og MVG skipanin kundi verið eitt tað fyrsta, ið trivið varð í.

Fíggjarmálaráðið er longu væl ávegis við digitalisering, og seinastu fráboðaðu sparingarnar og niðurlegging av skrivstovum eru partur av hesum. Hetta tykist verða ein skilagóð ætlan, hóast tað altíð er harmiligt hjá teimum, ið hava sítt dagliga yrki á teimum skrivstovum, ið verða niðurlagdar.

Til politikarar úr Vágum og Norðoyggjum, sum eru ónøgdir um gongdina, má bara sigast, at tað ber ikki til at krevja infrastruktur sum miðstaðarøki og framvegis vænta frammihjárættindini hjá útjaðarnum. Eitt skattakontór má ongantíð verða nýtt sum útjaðarmenning. Vil man politiskt brúka pengar í einum øki, so má tað gerast aðrar vegir.

Tá skipanir verða broyttar, so eigur hetta í 21. øld ikki at verða gjørt við at tað almenna útiviklar egnar skipanir, ið í dagsins KT umhvørvi gerast tøkniligir dinosaurar eftir heilt stuttari tíð, og kanska eisini eru av slíkum slag, at stovnar aftra seg við at brúka hesar skipanir.

Nógv hevur verið tosað um KT seinastu árini. Spurningurin til eitt og hvørt KT projekt hjá landinum eigur at verða, hvussu nógv skipanin sparir í tíð og kreftum.

Viðvíkjandi MVG skipan, so vilja vit skjóta upp, at landið útskrivar eina kapping til øll áhugaði, tað verði seg feløg ella einstaklingar, um at gera eina nýggja MVG innkrevjingarskipan, ið skal kunna umsitast so lætt og bíligt sum gjørligt, so at sum mest av innkravda peninginum fer til tær almennu tænastur, sum skattur og avgjøld nú einaferð eiga at fara til. Vinnarin av kappingini er tann, ið sparir mest í umsiting av MVG innkrevjingini. Vinningurin kundi verið til dømis nakrar hundrað túsund krónur og levering av skipanini.

Hví ikki royna hetta? Tað ringasta, sum kann henda er, at man betalir eina í landshøpi mikroskopiska premiu, meðan um væl veit við, so kunnu milliónir sparast hvørt ár.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvar eru okkara menn?

**Símun á Høvdanum**



Tað er ótrúligt at hoyra, at nú skulu almennir stovnar úr Norðoyggjum. Landið hevur brúkt milliónir uppá ein bygning í Klaksvík, fyri at gera Toll og Skattstovuna í Norðoyggjum tíðarhóskandi og so kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum við einum pennastrokið bara flyta Toll og Skattstovuna úr Norðoyggjum til Gøtu. Ein kann spyrjað, hvar okkara menn eru í hesum málinum?, sita teir bert hendur í favn í Tórshavn og fáa sær sína feitu løn ella hvat gera teir?. Sjálvt stjórin í Toll og Skattstovuni í Føroyum Óli Heinesen kemur frá Klaksvík. Hevur landsstýrismaðurin als ikki spurt seg fyri hjá Toll og Skattstovuni í Føroyum, hvat er best fyri økið?

Í Norðoyggjum búgva meira enn 5000 túsund fólk og sigast skal, at sera fáir almennir stovnar eru í økinum. Ynskiligt hevði verið, at okkara menn, also teir, sum vit velja fjórða hvørt ár, at teir verja borg suðuri í Havn, vóru meira um seg og royndi at fáa meira norður til Norðoyggjar, men tað sær soleiðis út, at tá ið teir hava runda klakkin, eru teir líka sum aðrir politikkarar í útjaðaranum. Rópa og skriva, men lítið og einki konkret kemur burturúr, men eitt krav man vera, at teir verja tað, sum vit hava arbeitt upp í økinum, gera teir ikki tað, so kunnu teir pakka saman og koma norðuraftur.

# Ílegur, fjølmiðlar og andstøða

**Hans Pauli Strøm**
*landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum*



Hósdagin 24. mars var framløga um uppskot til løgtingslóg um ílegugransking hildin í Almanna- og heilsumálaráðnum. Framløgan var fyri samgongulimum. Høvuðsorsøkin til, at undirritaði valdi at bjóða samgongulimunum til hesa framløgu, var tíðarneyð. Vanligt er, at samgongulimir fáa lógaruppskot til hoyringar, áðrenn tey verða løgd fyri tingið við eini høskandi tíðarfreist at lata aftur hoyringssvar. Men í hesum føri varð tíðin farin at ganga undan, og skotbráið fyri at lata aftur hoyringssvar hevði verðið alt ov stutt, um freistin at leggja lógaruppskotið fyri Løgtingið í hesi tingsetuni skuldi haldast. Og tað skuldi hon.

Framløgan av lógaruppskotinum skuldi sostatt koma í staðin fyri ta vanligu hoyringina, sum vanliga varir einar 14 dagar.

Í seinastu løtu vórðu fjølmiðlarnir eisini bodnir við, tí undirritaði eina stokkuta stund helt, at hann á henda hátt kundi fáa tvey fyri eitt, av tí at fleiri áhugað tíðindafólk høvdu biðið um kunning og samrøður um ílegugranskingina. Men í bjørtu glæmuni hjá tí eftirsnara var hendan avgerð í so bráð, og átti at verið ógjørd. Hetta kann eg bert harmast um.

Og hósdagin 3. mars stendur andstøðulimum í boði at fáa júst sama møguleikan, sum samgongulimir fingu hósdagin 24. februar, tí tá verður lógaruppskotið lagt fram fyri andstøðulimum í Almanna- og heilsumálaráðnum. Á henda hátt verða bæði samgongupolitikarar og andstøðupolitikarar væl fyri, tá orðaskiftið verður um lógaruppskotið í Løgtinginum.

Samstundis vil eg við hesum gera vart við, at vit, tá vit fyri knøppum ári síðani løgdu til rættis lógararbeiðið hjá Almanna- og heilsumálaráðnum fyri hesa tingsetuna, buðu andstøðupolitikarum í Trivnaðarnevndini til fundar, hetta fyri at fáa góð ráð og íblástur, og fyri at kunna um ætlaðar raðfestingar. Eisini hava vit havt framløgu fyri øllum tinglimum um serviðgerð uttanlands.

Hetta samskiftið raðfesta vit framvegis høgt. Tí, sum Bill Justinussen førir fram í lesarabrævi í bløðunum mikudagin 2. mars, tekur tað mangan nógv ár og fleiri enn ein landsstýrismann at greiða eitt lógaruppskot úr hondum. Heldur enn at kvetta alt framhald í drúgva arbeiðinum at smíða lógir, havi eg eftir førimuni roynt at troytt ta vitan, sum longu finst. Og frá fyrsta degi hevur Bill Justinussen víst seg at verið ein sera dýrmettur viðleikari, sum vælmeintur og eldhugaður hevur givið ráð og víst stuðul sum fáur.

Við góðum samstarvi og góðum samskifti arbeiðir fyrisitingin í Almanna- og heilsumálaráðnum ikki í sjálvdrátti, men fram ímóti einum felags máli, ið má vera eitt vælvirkandi almanna- og heilsuverk í Føroyum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.